# Programmfólk til Kringvarp Føroya

**Treytað av játtan søkir Kringvarp Føroya eftir einum programmfólki at seta í fast starv á deildini Mentan. Høvuðsuppgávan hjá tí setta verður at gera morgunsendingina, Góðan Morgun Føroyar, umframt aðrar uppgávur og sendingar á Mentan. Mentanardeildin ger sendingar og tilfar til útvarp, sjónvarp og internet.**

**UM STARVIÐ**

Góðan morgun Føroyar er á skránni gerandismorgnar frá klokkan 7:35 til 9:50. Sendingin loftar aktuellum evnum um alt landið, hevur fastar tættir og leggur upp til interaktivitet. Alt er kryddað við tónleiki. Sum partur av GMF hevur tú fjølbroyttar uppgávur. Tú skalt vera vertur, gera innsløg og framleiða tilfar til netið.

**VIT BJÓÐA**

- Eitt áhugavert og avbjóðandi starv í kreativum umhvørvi
- Eitt sjálvstøðugt arbeiði, sum tú kanst seta tín dám á
- Eitt starv, sum gevur tær innlit í føroyska samfelagið

**VIT YNSKJA**

- At tú hevur góð hugskot og ert kreativ/ur
- At tú hevur áhuga fyri samfelag og mentan
- At tú hevur góð samstarvsevni og ert jalig/ur
- At tú hevur áræði og arbeiðir sjálvstøðugt
- At tú megnar at halda freistir og ert væl skipað/ur

**VIT VÆNTA**

At tú hevur miðlaútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving og arbeiðsroyndir, sum kunnu javnsetast. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir á miðlaøkinum ella aðrar viðkomandi royndir. Tú skalt duga føroyskt væl og virðiliga í skrift og talu.

**SETANARVIÐURSKIFTI**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsfelagið og Fíggjarmálaráðið. Starvið er fulla tíð og verður sett skjótast gjørligt.

**UMSÓKNARFREIST O.A.**

Umsókn o.o. viðkomandi skjøl skulu sendast til umsokn@kvf.fo í seinasta lagi sunnudagin 26. mars. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Barbaru Samuelsen, leiðara á Mentan, á telefon 296610 ella við at senda teldupost til bs@kvf.fo.

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur, almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Kringvarpsstjórin stjórnar stovninum við tilvísing til stýrið, ið telur sjey limir. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum, ískoytisveitingum og eydnuspølum. Kringvarp Føroya hevur fýra deildir: Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting. Umleið 80 fólk eru í føstum starvi á stovninum.